# Námsfrøðingur millum gøtubørn í Cape Town

**Marjun Joensen greiðir her frá sínum upplivingum í Cape Town í Suðurafrika. Vandin fyri brotsverkum er stórur, og hóast Apartheit árini eru farin fram við, er tað langur vegur enn, áðrenn hvít og svørt kunnu liva saman**



*Hóast tey eru fátøk, vilja tey fegin bjóða mær tvær lekkrar høsnarungaføtur í karry*

## Frásøgn

**Marjun Joensen**
post@sosialurin.fo

Enn ein dagur. Sólin skýnir, fólk ganga oman og niðan eftir gøtuni við handilsposum í hondini. Onnur sita á café og nýta ein góðan caffé latté eftir dagsins stríð. Ein smádrongur gongur ímillum fólkið og spyr um restpenin, og á hinari síðuni á gøtuni gongur ein eldri maður og selir "superglue".

Vit eru stødd i miðbýnum í Cape Town, Suðurafrika. Ein livandi býur, fullur av móta, náttarlívi. Apartheid árini eru farin framvið, og her er pláss fyri øllum fólkasløgum. Hvít, svørt og litað ganga lið um lið, uttan at nakar ansar tí.

### Námsfrøðiliga uppgávan og fordómar

Eg eri júst komin til Cape Town ogskal verða her teir næstu 6 mánaðarnir. Eg skal í starvsvenjing sum námsfrøðingur. Eg skal arbeiða á einum heimi fyri dreingjum í aldrinum 8 til 18 ár. Teir eru fyrrverandi gøtubørn, men eru nú á barnaheimi og ganga í skúla. Rúsevni og kriminalitur er ein stórur partur av teirra lívi. Ein av mínum uppgávum er at hjálpa teimum framhaldandi at verða undir útbúgving og at skapa sær onnur áhugamál enn rúsevni og kriminalitet.

Tað er eingin loyna, at fordómar um HIV, kriminalitet, neyðtøkur hava staði frammalaga í høvdinum, áðrenn eg kom hertil. Eg havi fingið at vita alt um vandarnir við almennari transport, og at eg má ikki koyra í bili, tí at møguleikin fyri at onkur leypur inn í bilin við revolvara fyri at stjala, ella enntá "hi-jacka" meg er ov stórur. Her er í miðal ein neyðtøka um minuttin, so at ganga á gøtuni einsamallur er púra ørt.



*Børnini nýta skúlabúna, hetta er ein ofta óyvirkomilig útreiðsla hjá familiuni, og tey eru glað, tá ið vit koma innum hurðina við nýggjum búnum*

Eg hyggi rundan um meg og føli meg lættari av at her sær út til at verða OK. Cape Town sær út til at líkjast øðrum stórbýum í heiminum, eg skal nokk klára meg.

Eg havi avgjørt frá fyrstan tíð, at nú tá eg skal verða her í longri tíð, vil eg gjarna blanda meg uppí tað lokala samfelagið, so væl sum eg kann, og koma nærri inn at suðurafrikanskari mentan og siðum. Eg meldi meg tí upp í eitt róðrarfelag og finni mær eina íbúð at deila við øðrum suðurafrikanarum. Eg eri spent uppá, hvat komandi tíðin fer at bjóða mær.

Eftir at hava verið her í uml. ein mánaða, byrja mínir fordómar spakuliga at skifta skap. Tað, sum virkaði ræðandi í byrjanini, fyllir ikki so nógv longur. Millum annað var tað tankin um at verða í einum landi, ið hevur methøg tøl hvat viðvíkjir neyðtøkur, og ein HIV/AIDS trupulleiki ið fullkomiliga er lopin av sporinum, ið ræddi meg.

### HIV er ikki ein trupulleiki í Cape Town

Suðurafrika hevur ikki ein so stóran trupulleika við HIV/AIDS, ið eg annars helt, áðrenn eg kom hertil. Eftir at hava verið her ið eina tíð, byrji eg so smátt at ivast, um tey hava nakran trupulleika av tí yvirhøvur. Mótsatt hvat ein kanska kundi vænta, so eru ongar kampagnur, ið koyra uppá at ansa sær, og hvussu tú kannst verja teg í móti HIV. Tú lesur ikki nógv um støðuna i landinum viðvíkjandi HIV, og eingin tosar um tað. Vit vita øll, at hetta fær sjálvandi ikki trupulleikan at hvørva, og hjá mær, sum væl-upplýstur evropeari, at standa og hyggja at ímeðan tey bara lata standa til meðan fleiri og fleiri verða smittað kann virka ræðandi ogprovokerandi. Sambært lokala fólkinum, plagdi nógv at verða gjørt burturúr fyri at upplýsa um, og fyribyrgja HIV/AIDS. Tó meta tey, at tað bleiv ov nógv. Lýsingarnar hjálptu ikki og fólk gjørdust troytt av at hoyra upp í saman um tað sama. So, tíverri er veruleikin nokk tann, at natiónin eftir fleiri ár við stríði ímóti HIV/AIDS, stendur magtarleys og er á veg til at geva upp. Fólkið her er sum heild er í fornoktilsi. Tey eru blivin immun yvirfyri øllum kampagnunum. Tey hava fingið at vita alt um fyribyrging og smittuvandar meira enn einaferð. Men tá hetta ikki hevur forbetra støðuna, er tað ringt at síggja aðrar møguleikar. Hetta skal tó ikki skiljast sum um, at tey eru líkaglað. Óttin fyri at verða raktur av hesi álvarsomu sjúku sýnist at fylla meira enn trongdin til at vita, um tú er smittaður, tá tú á hendan hátt eisini sleppur frá at taka støðu til, hvat tað inniber at verða smittaður.

### Mín leiklutur sum lesandi

Sum námsfrøði-lesandi er ein partur av mínari læru at fara út í "townshippin" at gera uppsøkjandi arbeiði. Ein "township" er eitt úrslit av apartheidpolitikkinum. Av tí at tey svørtu og litaðu ikki høvdu loyvi til at búgva inni í býnum, funnu tey sær økið uttanfyri býin, har tey kundu búgva. Suðurafrika hevur nógvar av hesur "townshippum". Khayelitscha, ið er townshippurin, sum eg arbeiði í, liggur einar 40 km eystanfyri miðbýin í Cape Town og hýsti undir apartheid árunum einans teimum svørtu. Í dag sært tú eisini litað herúti. Men tað er í høvuðsheitinum, enn tey svørtu ið